Autisma

# Hava eisini trupulleikar í 2015

**Høvuðsuppgávan verður tí, at leggja dent á ta fakligu menningina innan verandi stovnar og tiltøk, segði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður**

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Hans Pauli Strøm luttók á fundinum sum avvarðandi landsstýrismaður.

Hann segði, at eins og vit gera nú, so fara vit eisini at dragast við trupulleikar í 2015, men tá skulu vit vera før fyri at bjóða fólki við autismu ta viðgerð, sum krevst, fyri at eisini á tí økinum skulu vera væl við.

Hann vísti á, at av tí at autisma er eitt fjøltáttað fyribrigdi, finnast ongar einfaldar loysnir, tí fólk eru so ymiskt fyri. Her kann talan vera um bæði tvørrandi umlætting og bústaðir, men eisini sernámsfrøðilig útbúgving og stuðul.

Harafturat helt hann at tað vantaði "ein hurð, sum ein kundi banka uppá", tí Almannastovan einki hevur at vísa á. Sum er, hava vit trupulleikar við samskipan millum tey ymsu ráðini og stovnarnar, og helst fer okkum altíð at tørva serkunnleika uttanífrá.

Hans Pauli Strøm nevndi eisini stuðulsskipanina til børn, sum byrjaði 1. januar í ár. Talan er um eina sentrala skipan, har ávísir persónar verða tilknýttir. Endamálið við hesum er at byggja upp ein fakligan førleika, tí fyrr hevur "gjósturin"í skipanini verið so nógvur, at fakligi førleikin ikki er hevur fingið møguleika at menna seg.

Høvuðsuppgávan verður tí, at leggja dent á ta fakligu menningina innan verandi stovnar og tiltøk.

Í Klaksvík hevur eydnast at byggja eitt sindur av einum tílíkum fakligum umhvørvi upp. Kanska er tað av tilvild, at tað júst er hent har, men møguliga kann hetta umhvørvi mennast til eina vitanarmiðstøð, har til ber at knýta ráðgeving og supervisjón til hetta umhvørvið. Harafturat nevndi landsstýrismaðurin møguleikan fyri at supplera vitanarumhvørvið við serligum fakpersónum, sum kunnu veita supervisjón, og á hendan hátt virka sum ferðandi ráðgevar á økinum.

Hans Pauli Strøm segði, at tørvurin á stovnsplássumog umlætting er stórur, og í seinastuni hevur verið arbeitt við at víðka útboðini í Klaksvík, og á fíggjarlógini 2006 eru 2,6 milliónir játtaðar til økta umlætting í Klaksvík.

## Skúlin fyri øll?

**Okkum tørvar enn fakfólk, segði leiðarin á Sernámsdeplinum**

Hans Eli Dahl, leiðari á Sernámsdeplinum, byrjaði við at greiða eitt sindur frá tí søguliga perspektivinum. Í 1964 byrjaði Spesialskúlin í Havn við deyvum børnum. Tá tey vóru flest, gingu 90 næmingar á skúlanum. Av tí at møguleikarnir hjá avvarðandi av bygd at vitja á skúlanum vóru avmarkaðir, var ráðgevingin til heimini eisini avmarkað.

Í dag eru tey 45 næmingar á skúlanum.

Í áttatiárunum tók kjak seg upp um "skúlan fyri øll", og við nýggjari fólkaskúlalóg kundu foreldur krevja, at betri skúlatilboð komu í teirra bygdum.

Hans Eli Dahl greiddi frá, at hóast serfrøðin í Føroyum er vaksandi, so tørvar okkum enn fakfólk, sjálvt um vit fáa nógv "forerandi", sum hann tók til, frá dønum, og samstarvið er gott.

Eitt úrslit av kanningum í Føroyum er, at talið av autistum her heima er lutfalsliga tað sama sum í okkara grannalondum, men Hans Eli Dahl spurdi retoriskt, hvar hesi børnini eru.

Svarið var, at vit í Føroyum hava 6 skúlar við einum autiskiskum barni, tveir skúlar við tveimum autistiksum næmingum, ein skúla við fýra, ein við trimum og so sjálvandi spesisalskúlan í Havn, har fýra autistiskir næmingar ganga. Við Asperger er líknandi støða, nevniliga 31 næmingar tilsamans.

Leiðarin á Sernámsdeplinum staðfesti, at sjálvandi fær ein einsamallur næmingur á einum lítlum bygdarskúla ikki sama tilboð sum ein næmingur á spesialskúla í Havn.

Fyri nøkrum fáum árum síðani kom ein arbeiðsbólkur fram til eitt úrslit, ið vísti, at tað hevði verið skilagott at farið undir at fyrireikað fimm tænastueindir, har fólk frá øllum avvarðandi myndugleikum skulu arbeiða saman, men forðingarnar í hesum sambandi eru tí ikki so fáar, vísti Hans Eli Dahl á. Sernámsdepilin setir ein sálarfrøðing og ein samskipandi serlærara, meðan kommunurnar seta skrivstovufólk og rinda skrivstovuhald. Hesi skulu so skipa fyri fundum við sosialráðgevarar o.o. Ætlanin er, at tann fyrsta av hesum sertænastueindum skal byrja í Eysturoynni í næstum, og skal hon ráðgeva skúlum, foreldrum o.ø.

